DAGSINS MEINING

Gott fótbóltssjónvarp

Neyvan taka vit ov dýran til, tá vit gita, at ein stórur partur av føroyingum í hesum døgum sita framman fyri sjónvarpsskiggjan nógv fleiri tímar enn vanligt er. Av teirri einfaldu orsøk at spælt verður um europameistaraheitið í fótbólti. Sjónvarp Føroya hevur eftir okkara tykki tikið eina skilagóða avgerð at senda allar dystirnar, eitt stig, sum uttan iva mong eru fegin um, tó at fótbóltur ikki hevur áhuga hjá øllum hyggjarum. Eftir okkara tykki eitt skilagott val.

EM-kappingin í fótbólti í Portugal er ein stórhendig í sær sjálvum. Her møtast bestu fótbóltstjóðirnar í Europa. Flestu av heimsins fimastu og dugnaligastu fótbóltsspælarum eru at síggja í hesi kappingini. Ein kann so halda um fótbólt, hvat ein vil. Men her er so spenningur og aktión. Her hevur tú eina ítróttargrein, sum ein heilur heimspartur fylgir við í. Ein ítróttargrein, sum ein stórur partur av okkara ungdómi sær upp til.

Gamaní er talan um spæl. Men tað snýr seg eisini um so nógv annað. Um spenning, kenslur, kapping, identitet, tjóðskap, um fimleika og entá list. At síggja góðan fótbólt er at líkna við góða og livandi list. Hetta sanna mong av okkum. Spælarar sum áskoðarar.

Hetta snýr seg eisini um meira enn bara tað at hyggja eftir øðrum. At Føroyar hava spælt móti fleiri av tjóðunum, sum nú royna seg og fara at bjóða uppaftur øðrum av í heyst, tá undankappingin til HM byrjar, er eisini vert at geva gætur. Og tað er eisini við slíkt høvi, at vit eiga at steðga á og umhugsa okkara egnu støðu. At tað hevur eydnast okkum at vera við í kappingunum millum heimsins fótbóltstjóðir er einki minni enn ein stórhending hvørja ferð og ein avbjóðing av teimum stóru. Í hesum sambandi hava vit nógv at takka teimum, sum tryggjaðu okkum altjóða viðurkenning. Her ikki minst fyrrverandi fótbóltsambandsformanninum Tórleivi Sigurðsson, sum við sínum framskygni og gløggskygni og sínum ótrúliga treiska og diplomatiska háttalag, syrgdi fyri, at teir stóru góvu okkum ans. Og uppaftur týdningarmiklari: vístu okkum virðing.

Vert er at minnast aftur á hetta fyri føroyskan fótbólt fremstu og djarvasta hending og takka teimum, sum ruddaðu slóð fyri okkara luttøku í altjóða fótbólti. Tað er kring slíka EM-kapping, at vit eiga at finna hetta framaftur í minninum. Hetta hevur nógv størri týdning enn mong geva sær fær um. Tí tað hevur eisini skapt áhuga og virðing fyri okkara landi og fólki á so mongum øðrum økjum eisini.

Tað er áhugavert at merkja sær, at lond, sum í hesi kapping dystast um EM-heitið, koma til Føroya at spæla í heyst, eitt nú fótbóltstjóðin yvir øllum, Frakland. Føroyingar eiga at vera fegnir um og ernir av, at tað býðst okkum høvi at sleppa at royna okkum móti slíkum liðum. Hvør skuldi trúð tí. Men veruleiki er tað. Og tað ræður um at troyta henda veruleika skilagott.

At okkara frægasti spælari nakrantíð, Todi Jónsson veður við aftur á okkara landsliði, sum skipari á flaggskipi Føroya, tað ger bert alt uppaftur betri og ljósari. Hann skal vera so hjartaliga vælkomin. Vit vænta okkum nógv av honum og ivast ikki í, at hann fer at liva upp til tær komandi og stóru avbjóðingarnar. Hann er við til at geva øðrum íblástur og trúgv. Lat okkum fegnast um hesar EM-leikirnar, men lat okkum eisini brúka teir til at hita upp í hugaheimi okkara til komandi undankapping í HM-kappingini.

Sosialurin

Sólborg sigldi á ísfjall við Ný Foundlandi

Hósnáttina sigldi rækjutrolarin, Sólborg, á eitt stórt ísfjall, tá ið teir vóru á veg inn at landa við Ný Foundlandi. Fleiri tons av ísi komu inn á dekkið, og skipið fekk eina buglu í gronina. Tíbetur hendi eingin mansskaði

SIGLDI Á ÍSFJALL
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

– Tíbetur hendi ikki manningini nakað, men skipið hevur fingið eina buglu á gronina, sigur Petur Jacobsen, reiðari

Savnsmynd

Petur Jacobsen, reiðari, sigur, at Sólborg hevði einar tveir tímar eftir til lands, tá ið hendingin fór fram. Skipið hevur eini 500 tons inni, sum skuldu leggjast upp í Bay Roberts í Ný Foundlandi.

– Tað er ofta nógv toka í Ný Foundlandi um summarið, og soleiðis var eisini síðstu nátt.

Reiðarin sigur, at ísfjallið, sum Sólborg sigldi á, hevur verið rættiliga stórt, tí skipið fekk fleiri tons av ísi inn á dekkið.

– Tíbetur hendi ikki manningini nakað, men skipið hevur fingið eina buglu á gronina.

Enn er ikki greitt, hvussu verður við skipinum, men Petur vónar, at Sólborg sleppur útaftur, tá ið teir eru lidnir av landa.

– Hol er ikki komið á skipið, og nú tað er summar, vóna vit, at Sólborg sleppur útaftur beinanvegin. Men neyðugt er so, at skipið fyrst verður kannað.

Petur vísir á, at einir 11-12 mans skuldu fara yvir til Ný Foundlands at skifta við menn, sum skuldu koma heim.

– Nú er ferðin útsett, til greitt er, hvussu verðið verður við skipinum, sigur hann.

Reiðarin sigur, at Sólborg byrjaði at landa hósmorgunin, og hann vónar, at klárt verður at loysa aftur skjótast tilber.

Ikki óansni

Petur Jacobsen leggur dent á, at orsøkin til hendingina, var ikki óansni, tí siglt varð eftir umstøðunum, sum eru á hesi leiðini, tá ið kjaftsvart er í toku, sum tað eisini var hesa náttina.

– Tað hendir, at ísfjøll eru á leiðini hesa tíðina av árinum. Tey loysna og reka suðuryvir, har tey við tíðini tiðna burtur í einki. Hann sigur, at slík ísfjøll vanliga síggjast á radaranum, men er nógv ferðsla á leiðini, kann henda, at skipið fær skeiv signalir.

Petur Jacobsen sigur, at Sólborg hevur verið til fiskiskap í einar tveir mánaðir.

– Tað er ikki nógv at siga um sjálvan fiskiskapin, sum verið hevur hesar báðar mánaðirnar, men prísirnir á rækjunum eru lágir, sigur reiðarin at enda.

Við Sólborg hendan túrin eru 19 mans.

VIÐMERKINGAR

Málið um Jógvan S. - nakrar rættleiðingar

Løgtingið - Umsitingin

Við hesum skal løgtingsumsitingin koma við rættleiðingum til okkurt av tí, sum er fórt fram í sambandi við hetta mál.

Løgtingsumsitingin hvørki kann áleggja ella hevur álagt Jákup Mikkelsen, tingmanni, at hava løgfrøðiligar grundgevingar fyri eini minnilutastøðu í landsstýrismálanevndini.

Hvat viðvíkur samsvarinum millum niðurstøðuna hjá landsstýrismálanevndini og dómin í málinum, so kann dómurin, soleiðis sum sakin er førd, ikki nýtast til at staðfesta nakra andsøgn.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Hildu føðingardag í skúlanum

Mikudagin skipaði skúlin í Gøtu fyri hátíðarhaldi í sambandi við, at skúlin fylti 30 ár. Nógv fólk var til hátíðarhaldið, har núverandi og fyrrverandi borgarstjórar hildu røður

HÁTÍÐARHALD
Jonhard Hammer

Børnini í 1. flokki sungu sera væl og kanska er ein nýggj stjørna í rúgvuni

Mikudagin var nógv gjørt burtur úr, at skúlin í Gøtu hevði føðingardag. Tað eru 30 ár síðani, at skúlin við Gøtugjógv var tikin í nýtslu, og hetta var feiðrað alla dagin.

Tað byrjaði við skúlabørnini fingu hvør sína luftballón og fór út í garðin at gera eitt 30-tal, sum varð avmyndað. So var eisini okkurt til magan, tí skúlin bjóðaði pylsur, sunkist og annað gott.

Inni í skúlanum var síðani møguleiki at vitja stóru framsýningina, sum varð gjørt í sambandi við dagin. Á hesi framsýning vóru nógvar gamlar myndir av næmingum, tiltøkum í skúlanum og annað. Her var nógv forvitnisligt at hyggja eftir, og tað nýttu nógv fólk høvi til.

Kaffi í fimleikarhøllini

Mikukvøldið var skipað fyri hátíðarhaldi fyri øllum bygdarfólkinum, og hóast nógvur góður fótbóltur er at síggja í sjónvarpinum í hesum døgum, komu nógv fólk til hátíðarhaldið. Eini 300 fólk vóru til staðar í fimleikarhøllini í skúlanum, har borð og stólar vóru sett upp, og kaffi og lagkøkur vóru á borðinum.

Skúlastjórin Karl Anfinn Thomsen beyð fólkunum vælkomin og segði eitt sindur um skúlan. Borgarstjórin, Halltóra Ranghamar, helt røðu, og hon greiddi eitt sindur frá sínari skúlatíð í Gøtu – hon gekk bæði í fólkaskúla og í miðnámsskúla í Gøtu.

Drúgv søga um skúlan

Vinnulívsmaðurin Oddfríður Gregersen var borgarstjóri í Gøtu, tá ið skúlin lat upp fyri 30 árum síðani, og hann helt eisini røðu týskvøldið. Hann greiddi frá søguni um skúlan í Gøtu.

Longu í 1964 var ætlan um at byggja nýggjan skúla í Gøtu, og hóast skúlanevndin í Gøtu samtykti hetta, hendi ikki stórvegis meira í málinum í nógv ár. Eftir kommunustýrisvalið í 1970 vóru ítøkilig stig til at gera nýggja skúlan til veruleika, og í 1974 varð nýggi skúlin í Gøtu vígdur. Hann kostaði góðar fimm milliónir krónur at byggja.

Meira undirvísing

Harald Hammer, sum hevur undirvíst børnum í 38 ár, er tann einasti lærarin, sum er eftir frá tí gamla skúlanum í bygdini. Hann greiddi frá, hvussu tað var at undirvísa í 29-skúlanum, samstundis sum nýggi skúlin varð bygdur. Alt var eitt stórt byggipláss, og fólk vóru stúrin fyri, at okkurt óhapp skuldi henda, tí nógvar maskinur vóru á skúlaøkinum. Men alt spældi tíbetur væl av.

Harald legði dent á, at í Gøtu er ein góður skúli. Nógvir ungir og kreativir lærarar eru á skúlanum, men hann fýltist á, at skúlaskipanin í dag er ikki nóg góð. Nógv tíð hjá lærarunum fer við at gera ætlanir av ymsum slagi og frágreiðingar ístaðinfyri at meira tíð verður brúkt til at undirvísa børnunum. Tað er hóast alt tað, sum lærararnir fyrst og fremst eiga at gera.

Hann heitti á myndugleikarnar um gera nakað við hetta, áðrenn skipanin kom at merkja eina afturgongd fyri skúlan í framtíðini.

Næmingar sungu og spældu

Umframt røður og kaffi var eisini tónleikur á skránni. Fyrsti flokkur í skúlanum sang nakrar sangir, og tað var undir kønari leiðslu av Sædis Eilifsdóttir. Eisini sætti flokkur hevði okkurt at bjóða, og tað var blokkfloytuspæl, sum Julia hevur stríðst og strevast fyri á skúlanum í nógv ár.

Kvøldið endaði við einum felagssangi, sum skúlastjórin hevði gjørt. Sangurin eitur »Skurðapisan kvøður«.

Aftaná leitaðu øll fólkini sær í skúlan at hyggja eftir stóru framsýningini.

Sædis Eilifsdóttir hevur lyft tónleikastøðið upp í Gøtu skúla

Harald Hammer er einasti lærari, sum er eftir av tí gamla skúlanum

Oddfríður Gregersen, ímyndin av vinnulívinum í Gøtu og onkuntið kallaður »kommunan« av smádreingjum í gomlum døgum